# Einki nýtt frá SEV

Fríggjamorgunin var stýrisfundurin í SEV tikin upp aftur eftir, at hann varð niðurlagdur farna fríggjadag.

Teir sjey stýrislimirnir fóru á fundin á Hotel Hafnia klokkan hálvgum tíggju fríggjamorgunin saman við Hans Tausen Olsen, formanni í umboðsnevndini og tveimum løgfrøðingum.

Um tólvtíðina komu fundarluttakararnir út aftur av fundinum, men ikki bar til at fáa nakrar viðmerkingar, um hvat var farið fram og viðgjørt á fundinum.

– Fundurin er bara niðurlagdur til klokkan eitt í dag, og tí hava vit onga viðmerking í løtuni, segði Leivur Hansen, stýrisformaður.

**tn**



*Stýrisfundurin í SEV var tikin upp aftur á Hotel Hafnia fríggjamorgunin, men tá ið blaðið fór til prentingar, var einki nýtt at frætta frá fundinum*

## Hundafelagið fær egið øki

**Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar Býráð mánakvøldið var ein umsókn um eitt øki til hundafelagið viðgjørd. Nevndin hevur víst felagnum á eitt øki í Villingardali**

**HUNDAFELAG**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hundafelagið søkti herfyri býráðið um eitt innhegnað vallað lendi upp á umleið 10.000 fermetrar, sum felagið kann nýta til kappingar og aðra íðkan. Umsitingin hjá Tórshavnar Kommunu hevur síðani viðgjørt umsóknina og kannað eftir, hvørjir møguleikar eru, og lendisdeildin hjá kommununi hevur síðani latið nøkur uppskot til staðseting av øki.

Lendisdeildin hjá kommununi vísti á átta ymisk pláss í kommununi, og tá ið nevndin hevði hugt at uppskotunum, gjørdi hon av at vísa hundafelagum á eitt øki við frákoyringina til Mold- og Tyrvingarplássið í Villingardali.

So nú hava hundaeigarar fingið eitt øki, har teir kunnu fara og stuttleika sær saman við hundinum hjá sær.

## Føroyskir skótar á heimsins størstu legu

**TÍÐINDASKRIV**

Føroyskir skótar fáa nú høvi at luttaka í størstu skótaleguni nakrantíð, sum verður í Onglandi á sumri í 2007.

Talan er um 21. heimsjamboree'ina, sum verður skipað fyri at hátíðarhalda, at skótarørslan fyllir 100 ár. Tað var tann 1. august í 1907, at onglendingurin Baden-Powell skipaði fyri fyrstu leguni fyri dreingjum á Brownsea Island, teirri fyrstu skótaleguni nakrantíð.

Frá 27. juli til 8. august næsta ár fara 40.000 skótar úr øllum heiminum at minnast hesa hending á eini stórfingnari legu í Hyland Park, eitt sindur norðan fyri London.

Føroysku skótafylkingarnar eru bodnar at luttaka saman við donskum og grønlendskum skótum. Allir skótar, sum eru fyltir 14 ár, men ikki eru fyltir 18 ár, kunnu luttaka. Skótar eldri enn 18 ár kunnu søkja um at luttaka sum leiðarar. Tilmeldingarfreistin er 1. mars.

Fyri teir skótarnar, ið fara at luttaka, verður talan um spennandi fyrireikingar á heysti 2006 og á vári 2007.

Meira fæst at vita við at leita inn á heimasíðuna hjá Føroya Skótasambandi www.scout.fo ella við at venda sær til Høgna Jensen, samskipara, telefon 211030 ella teldupost vitamargarin@kallnet.fo.

